# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

8. apríl fingu Vivian og Pauli Guðjonsson, Klaksvík, ein son. Hann eitur Milan. Hann var 52 cm langur og vigaði 3750 gr.

15. apríl fingu Olevina og Dávið Sundsskarð, Keypmannahavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3.650 gr.

15. apríl fingu Kathie og Heri Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3105 gr.

16. apríl fingu Linda F. Guttesen og Øssur Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

17. apríl fingu Óluva Midjord og Regin Borðoy, Skálafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3070 gr.

17. apríl fingu Vivie og Bárður Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2950 gr.

17. apríl fingu Jenny og Magnar Næs, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

18. apríl fingu Ingun Mørkøre og Jógvan K. Eidesgaard, Eiði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 5000 gr.

20. apríl fingu Anja Højgaard og Robson Pereira, Toftir, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3700 gr.

21. apríl fingu Randi Grunnveit og Zacharias Thomassen, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3050 gr.

**Konfirmantar í Glyvra kirkju sunnudagin 26. apríl**
Bjørg Olsen, Æðuvík.
Súsanna Olsen, Lamba
Jórunn Hansen, Runavík.
Dania Andrasdóttir Olsen, Rituvík.
Ásleyg Toftegaard, Saltangará.
Birita Debes, Rituvík.
Rebekka Hansen, Glyvrar.
Tróndur Ellingsgaard, Saltangará.
Albert Róin Johannessen, Æðuvík.
Jóhannus Bjartason Hansen, Saltangará.
Rani Kristiansen, Rituvík.
Jákup Andrias Gaardbo, Runavík.
Petur Langgaard, Runavík.
Oddmar Nielsen, Saltangará.
Hjalgrímur Kastalag, Æðuvík.
Jóannes Skibenæs Nielsen, Skipanes.

**Konfirmantar í Nólsoyar kirkju 26. apríl**
Laila Hansen
Maria Joensen
Jakobina Johannesen
Anna Malan Jógvansdóttir

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin 10. mai í Filskov kirkju verður Bárður Hentze, sonur Inga Hentze Hoyvík, konfirmeraður. Adressan er: Postgade 12, Filskov, 7200 Grindsted, Danmark.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin tann 10. mai verður í Fasterholt kirkju (Danmark) Victor John Andreasen, sonur Rósu Andreasen og Victor Olsen, konfirmeraður. Adressan er: Ejstrupvej 16, DK-7330 Brande
+45 97188823

**Prógv**
Í januar 2009 fekk Ketty Thomassen úr Sandavági prógv sum Professionsbachelor sum námsfrøðing á Københavns Pedagogseminarium

# Jens Werner til Føroya

Tann 14. og 15. august 2009 vera Jens Werner, sum er kendur frá donskusjónvarpsrøðini "Vild med dans", og konanAnette Werner, í Føroyum og undirvísa í dansi.

Talan er um undirvísing fyri byrjaðar, og umleið 40 pør kunnu luttaka.

Tilmelding fer fram á teldupostadressuni: wellness@wellness.fo. Prísurin er 1.300 krónur. Tíð og stað verður lýst seinni.



# Bindiklubbur í framhaldsdeildini

Mynd frá realskúlaframsýningini sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin av nøkrum av gentunum skúlaárið 1964-65, sum hava ein bindiklubba.

**F.v.:** Marita Næs (Jespersen), Rakul Dalsgarð, Sigrid Winther (Arge), Elsa Bergitta Petersen, Anna Helena Zachariassen (Danielsen), Sunneva Dalsgaard (á Rógvi) og Elna Skylv Hansen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 488)

*Myndaeigari: Anna Helena Danielsen*



Fyri 35 árum síðan:

# Størsta flogfar sum hevði lent

Týsdagin 30. apríl 1974 kom eitt Boeing 737 ferðamannaflogfar frá enska flogfelagnum Britannia Airways til Føroya. Ferðin úr Kastrup til Vágar tók tveir tímar, og við flogfarinum vóru umleið 30 starvsfólk og teknikarar hjá SAS, Mærsk Air, Danair og ferðslumyndugleikunum.

Flogfarið var tað størsta, ið nakaratíð hevði lent í Vágum. Tað hevði tveir jetmotorar og kundi taka 130 ferðafólk.

Endamálið við ferðini var at gera eina royndarflúgving og vita, hvussu væl hetta flogfar klárar lending og start á flogvøllinum í Vágum, og um tað møguliga kundi nýtast til framtíðar flúgving upp á Føroyar.

Áðrenn flogfarið fór avstað aftur, vóru tríggjar royndir gjørdar viðvíkjandi fráfaring og lending undir ymsum umstøðum. Royndirnar eydnaðust sera væl.




*Flogfarið hjá Britannia Airways er til høgru á myndini*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1974*